# Julian skal bíða í nakrar vikur afturat

**B68 fer í kvøld undir venjingarnar, ið hava sum mál at endurvinna fasta plássið í bestu deildini, sum toftamenn áttu í fjórðings øld**

**B68**
*Jóannes Hansen*

Í kvøld, mánakvøldið 9. janaur, fer B68 av álvara undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. B68 er nýtt lið í FORMULA DEILDINI. Eftir at hava verið eitt ár í næstbestu deildini og vent, er Tofta Ítróttarfelag aftur har, sum teir vóru øll árini frá og við 1981 og til og við 2004. Málið í hesum kappingarárinum er at endurvinna fasta plássið í deildini.

Í fjør var Julian S. Johnsson spælandi venjari. Tað verður hann ikki í ár. Jóannes Jakobsen, sum áður hevur verið venjari hjá B68, er aftur á Svangaskarði. Julian S. Johnsson telist millum spælararnar umframt, at hann eisini er hjálparvenjari, og fram til fyrsta februar verður tað hann, sum fer at standa fyri venjingunum.

Sambært B68 heimasíðuni, so er Julian ikki komin heilt fyri seg eftir meina krossbandsskaðan, sum hann fekk í Leirvík tíðliga síðsta summar. Julian er nærlagdur, og hann hevur drivið á at venja eftir ætlanunum, sum serfrøðingarnir hava givið honum. Tað sær gott út, men enn fara nakrar vikur at ganga, áðrenn Julian verður førur fyri at venja á jøvnum føti við hinum B68 spælarunum.

Í síðstu viku kannaði íslendski serlæknin Harry Guðmundsson knæið hjá Juliani á Landssjúkrahúsinum. B68 heimasíðani veit sambært íslendinginum at siga, at vøddarnir í knænum, sum varð skurðviðgjørt í summar, nú eru nærum so væl fyri, sum teir í fríska knænum eru tað. Julian hevur fingið boð um at halda fram við at renna, súkkla og at gera rørsluvenjingar.

Julian skal aftur til kanningar í mars, og tá verður vónað og roknað við, at tað fer at bera til at venja saman við hinum B68 spælarunum.

Í fyrstu atløgu eru boð send eftir 21 spælarum. Tveir teirra - Óli Olsen og Jóhan Dávur Højgaard - eru í løtuni til skips, so teir fara ikki at møta til fyrstu venjingarnar. Fimm spælarar eru blaðungir dreingir, sum hava spælt millum lítið og einki á besta liðnum. Teir eru Niklas Joensen, Niklas Poulsen, Jóhannes Heinesen, Petur Heinesen og Petur Jóhan Heinesen.

Hinir spælararnir, sum skulu møta á Svangaskarði í kvøld, eru Alex Troleis, Arnbjørn Danielsen, Ovi Magnussen, Øssur Jacobsen, Øssur Hansen, Jann Ingi Petersen, Kristian Anton Andreasen, Jóhan Petur Poulsen, Súni Fríði Barbá, Kári Hansen, Magnus Jakobsen, Fróði Jensen, Tórður Thomsen og so Julian S. Johnsson.

Sammett við í fjør eru fýra nýggir spælarar í B68 fyrireikingunum til nýggja kappingarárið. Teir eru Kári Hansen og Tórður Thomsen, sum í fjør vóru í NSÍ (umframt at Tórður eisini eitt skifti var í Fuglafirði), og Magnus Jakobsen og gamli B68 kenningurin Súni Fríði Barbá, sum í fjør spældu á Argjum, har Jóannes Jakobsen var venjari.

## AGF´ari royndarvenur í Gøtu

Heimasíðan hjá GÍ skrivar, at 19 ára gamli danin, Lasse Borg, fer komandi dagarnar at royndarvenja í Gøtu. Lasse Borg er málverji og leikar við AGF.

Úr Gøtu vóna tey, at ungi danski málverjin hevur neyðugu dygdarnar til at vinna sær ein sáttmála við GÍ, sum vóru rættiliga óhepnir við skaðum á málmansplássinum farna kappingarár.

-páll

# Reklamustjórin skal styrkja LÍF

**Eftir 10 ára frávegur frá fótbóltinum, ætlar Petur Slyne sær nú aftur at gera um seg. Saman við LÍF leggur hann nú til brots við venjingunum**

**COME-BACK**
*Jákup Mørk*



*Eftir 10 ár uttan fyri føroyska fótbóltsheimin, hevur Petur Slyne nú sett sær nýggj mál. Saman við liðfeløgunum í LÍF vil hann nú verða partur av uppflytingarstríðnum í næstbestu føroysku røðini*

Nógv av viðhaldsfólkunum hjá HB munnu minnast tíðina, tá Petur Slyne gjørdi um seg á besta liðnum. Hóast kvikleikin ikki var hin sami, sum hjá so nógvum av liðfeløgunum, so var tekniskt sterki verjuspælarin í fleiri ár ein av stuðulsspælarunum á liðnum.

Bert 16 ára gamal varð hann slúsaður inn í hópin, og í fleiri ár var hann roknaður sum púrasta fastur partur av hópinum. Hóast FM-heitini í ’88 og ’90 ivaleyst munnu teljast sum hæddarpunkt hjá spælaranum sjálvum, so munnu áskoðararnir serstakliga minnast eina einstaka hending frá 1989. Í fyrstu finaluni um Løgmanssteypið, har HB spældi málleysan javnleik móti B71, var Petur spælarin, sum var næstur at avgera dystin. Hetta tá hann við eium framúr hálvfluktara úr 18 metrum bankaði bóltin á undirsíðuna á tvørtrænum, men inn fór bólturin altso ikki.

### Valdið lýsingarnar framum

Hvussu var og ikki, so vann HB seinnu finaluna ta ferðina, soleiðis at Petur eisini fekk tað steypið afturat savninum. Men árini hjá Peturi í HB gjørdust ikki so nógv fleiri. Longu eftir kappingarárið í 1992, segði hann fyribils farvæl til fótbóltin. Talan gjørdist tó um eina stutta afturvendan, tá hann í 1996 eisini spældi við, men so tóktist alt eisini vera liðugt. 25 ára gamal hevði hann tá eisini roynt tað mesta í føroyskum fótbólti, og tí var hugurin ikki heilt tann sami.

– Hetta var eisini tíðin, tá fótbólturin gjørdist meira og minni professionellur í Føroyum. Tað setti størri krøv til spælararnar, og tá eg so varð noyddur at velja millum fótbóltin og starvið sum lýsingarstjóri, valdi eg yrkið framum, sigur Petur.

Men nú røkist fyri, at talan verður um eitt come-back. Í øllum førum hevur Petur játtað at verða partur av hópinum hjá LÍF. Og sjálvur ætlar hann sær í øllum førum eisini at sleppa í part úti á vøllinum.

– Nú fáa vit at síggja. Fyrst og fremst, so havi eg tikið hetta sum eina avbjóðing til mín sjálvan. Eg havi als ikki spælt veruligan fótbólt hesi 10 árini, síðani eg gavst í 1. deild, so eg skal fyrst av øllum koma í venjing. Komi eg tað, so vóni eg sjálvandi, at eg eisini kann verða partur av liðnum - og vónandi eisini partur av uppflytingarstríðnum í fyrstu deild.

– Fyrst av øllum ræður tó um at koma í venjing. Higartil havi eg sníkt meg onkran rennitúrin, men tað hevur mest av øllum verið í loyndum, so fólk ikki verða fullkomuliga skelkað, tá tey brádliga síggja meg renna, ljóðar tað at enda flennandi frá lýsingarstjóranum.

**Sunset-kappingin**
**FM-bólkurin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 23 | 16 | 7 | 2 |
| 2 Stjørnan | 1 | 1 - 0 - 0 | 25 | 21 | 4 | 2 |
| 3 Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 4 Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 16 | 23 | -7 | 0 |

Sunset-kappingin

Niðari bólkurin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 28 | 18 | 10 | 2 |
| 2 VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 29 | 27 | 2 | 2 |
| 3 Tjaldur | 1 | 0 - 0 - 1 | 27 | 29 | -2 | 0 |
| 4 Søljan | 1 | 0 - 0 - 1 | 18 | 28 | -10 | 0 |

Atlantic Airways-kappingin

| | d | v - j - t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 H71 | 1 | 1 - 0 - 0 | 313 | 258 | 55 | 10 |
| 2 Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 291 | 259 | 32 | 8 |
| 3 VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 304 | 297 | 7 | 8 |
| 4 StÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 277 | 281 | -4 | 8 |
| 5 KÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 273 | 308 | -35 | 2 |
| 6 Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 289 | 344 | -55 | 1 |